# Avgerandi dystur á Skála í kvøld

**Í kvøld verður ein sera spennandi dystur í bestu mansdeildini í hondbólti leiktur í høllini á Skála. Steypavinnararnir úr StÍF fáa vitjan av oddaliðnum Kyndil**

HONDBÓLTUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Kyndil og Jacob Jónsson hava vanligani gott tak á StÍF, sum teir ikki hava tapt ímóti síðani í grundspælinum seinasta kappingarár*

Um strandingar ætla at gera sær nakrar sum helst vónir um at verða við í oddastríðnum, er neyðugt at teir vinna heimadystin móti Kyndil í kvøld. Strandingar eru nummar fýra í landskappingini, og fimm stig eru upp til Kyndil á fremsta plássinum.

### Kyndil gott tak á StÍF

Hetta er fjórðu ferð í ár, at liðini hittast í landskappingini. Allir hinir tríggir dystirnir eru endaðir við sigri til havnarmenn, men sjáldan hevur nakar serligur munur verið millum liðini. Í dystinum í Havn miðskeiðis í oktober mánaða vann Kyndil við tveimum málum, 26-24, og ein góðan mánað seinni vann havnarliðið við bert tí eina málinum inni á Skála, 29-28, í einum sannum gysara.

Kyndil, ið ikki hevur spælt serliga sannførandi í seinastuni, hevur allar mans tøkar til týdningarmikla dystin í kvøld. Strikuspælarin og bindiliðið í verjuni, Janus Einar Sørensen, vandi mánakvøldið við aftur fyri fullari megi, eftir at hann hevur verið uttan fyri við skaða í nakrar dystir. Eisini teir báðir, Jacob Jónsson og Finnur Hansson, ið hava verið nógv darvaðir av skaða í seinastuni, verða við, so Kyndil kemur inn á Skála við sterkastu manning.

Strandingar hava enn ikki slept vónini um at endurvinna føroyameistaraheitið. Liðskiparin hjá StÍF, Jón Rasmussen, sigur, at enn eru 10 stig eftir at spæla um, og fimm stig eru upp til oddasessin, so alt kann henda. Hinvegin ásannar hann, at tapur StÍF í kvøld er FM-heitið mist. Jón sigur eisini, at StÍF leingi hevur havt tað trupult við Kyndli, og teir hava ikki vunnið á teimum grønu síðani í grundspælinum seinasta kappingarár, men nú skal vend koma í. Strandingar hava alt sítt fólk tøkt til dystin í kvøld við undantaki av málverjanum Marian, sum neyvan spælir aftur í hesum kappingarárinum. Ungi og evnaríki Sveinur Justinussen, ið hevur verið skaddur í ein mánað, var aftur á liðnum sunnudagin, tá ið StÍF á heimavølli tapti ímóti Neistanum, og hann verður eisini við aftur í kvøld.

Dystirnir millum StÍF og Kyndil eru vanliga rættuliga undirhaldandi dystir, og flestu hondbóltskønu føroyingar halda, at hetta eru tvey lið, ið standa ógvuliga væl til hvønn anna. Bæði liðini spæla skjótan hondbólt við nógvum skjótálopum, so teir mongu áskoðararnir, ið kunnu væntast til dystin í høllini á Skála í kvøld, fáa allarhelst ein undirhaldandi dyst.

# Fult umfar hjá kvinnunum

**Mest áhugaverdi dysturin í kvinnudeildini í kvøld er uttan iva dysturin í Vestmanna, har oddaliðið Stjørnan er á vitjan hjá VÍF**

HONDBÓLTUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Joan M. Djordjevic og liðfelagar hennara í Stjørnuni hava ein truplan dyst í Vestmanna í kvøld*

Í bestu kvinnudeildini í hondbólti er fult umfar á skránni í kvøld. Søljan og Neistin hittast á Giljanesi, StÍF og Kyndil dystast á Skála, og í Vestmanna verður toppdystur millum VÍF og Stjørnuna. Dysturin í Vestmanna kann gerast ógvuliga spennandi, tí VÍF er eitt av fáu liðunum, ið kann gera nakað við tey bæði oddaliðini Stjørnuna og VÍF.

### Stjørnan hevur ráð at tapa

Dystirnir millum VÍF og Stjørnuna eru vanliga rættuliga javnir. Hetta er fjórðu ferð í hesum kappingarárinum, at liðini hittas, og klaksvíkskvinnur hava vunnið tvær ferðir, meðan VÍF hevur vunnið einaferð. Tá ið liðini hittust í Klaksvík miðskeiðis í oktober mánaða, vóru tað kvinnurnar úr Vestmanna, sum vunnu við trimum málum. Ein góðan mánað seinni hittust liðini í Vestmanna, og tá vann Stjørnan við bert einum máli. Tann fyrri dysturin millum Stjørnuna og VÍF í endaspælinum, var leiktur í Klaksvík 18 januar, og tá vann heimaliðið Stjørnan 27-24. Sostatt hevur tað ongantíð verið tann stóri munurin, tá ið hesi bæði liðini hava hitst í landskappingini, og spennandi verður at síggja, um VÍF megnar at gera nakað við steypavinnararnar úr Klaksvík.

Um tað skuldi hent seg, at heimaliðið vann dystin í kvøld, so er tað heldur ikki nøkur vanlukka fyri Stjørnuna. Um vit ganga út frá at bæði Stjørnan og VB annars vinna allar sínar dystir, innan liðini hittast í finalubrakinum í Vági 27 marts, so verður tað bert tað eina stigið á muni undan dystinum. Tað vil siga, at vinnur Stjørnan í kvøld, eru tær eitt stig framman fyri, meðan VB er eitt stig framman fyri, um VÍF vinnur í kvøld. Tað merkir so at liðið, ið vinnur dystin í Vági, allarhelst verður føroyameistari.

## Komandi dystir

**Hondbóltur**
**1. deild kvinnur**

| Dagf. | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 03.03 | 18.30 | StÍF-Kyndil | Kristian Johansen & Sámal Hansen |
| 03.03 | 19.00 | Søljan-Neistin | Jákup S. Simonsen & Høgni M. Joensen |
| 03.03 | 19.00 | VÍF-Stjørnan | Hannis Wardum & Uni Wardum |

**1. deild menn**

| Dagf. | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 03.03 | 20.00 | StÍF-Kyndil | Kristian Johansen & Sámal Hansen |



# Tryggir í 1. deild

**Eftir tvey heldur skuffandi úrslit í seinastu umførunum í vikuskiftinum, endaðu føroyingar á flatlondum á einum 6. plássi, bert hálvt stig frá 5. plássi. Samanumtikið varð kappingarárið tó nøktandi**

TALV

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



Talvfelagið Føroyar í Keypmannahavn hevur fingið virðing kring danska talvheimin. Mong høvdu væntað, at felagið ikki fór at megna at halda seg uppi fyrsta árið tað royndi seg í elitudeildini. Tvørturímóti, so vórðu talvútisetarnir ongantíð í niðurflytingarvanda. Vit royndu at kalla alt kappingarárið at nærkast triðja plássinum, og hampiligur møguleiki var eisini at førka okkum av 6. plássinum, vit høvdu framanundan tveimum teimum seinastu dystunum.

Tíverri gekst ikki heilt til vildar leygardagin, tá vit hittu toppliðið Skolerne, sum halda til í Århus. Miðjað varð ímóti einum 4-4 úrsliti, og sanniliga vóru støður á borðunum til fýra stig. Men seinasta tíman í dystinum brast hendan vónin, og vit máttu taka til takkar við einum 2,5 - 5,5 tapi, sum tó kortini ikki kann sigast at vera eitt sermerkt vánaligt úrslit.

Sunnudagin vórðu allir samdir um at fara kompromileyst eftir knúsandi stórsigri móti botnliðnum Århus. Fløskaði úrslitini seg í seinasta umfarinum, var ein møguleiki fyri at enda í ovaru helvt. Knúsandi stórsigurin bleiv tó bert til ein tepran 4,5 — 3,5 sigur.

Tvey tey niðastu liðini - Nørresundby og Århus - flyta niður í 2. deild. Vit vórðu 7,5 stig frá niðurflytingini.

Norski stórmeistarin á liðnum, Einar Gausel, varð okkum ein góður fongur. Hann leikti trygt við svørtum, og vann flest øll talvini við hvítum. At hava slíkan mann á fyrsta borði er tryggjandi. Flóvin Tór Næs og yvirritaði vinna sær fitt av rating, meðan Heini Olsen og Heini Danielsen høvdu miðalgóð úrslit. John Rødgaard var ein effektivur útskiftari.

Tíverri gekst ikki eins væl hjá Nikolaj Borge, John Arna Nilssen og Eyðun Nolsøe á ávíkavist 2., 3. og 5. borði.

Helsinge vann rættiliga trygt DM fjórða árið á rað. Málið hjá okkum komandi kappingarár er at røkka ovaru helvt, helst heiðursmerkjapláss.

**1. deild - Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| 1 Helsinge | 39,5 |
| 2 Skolerne | 34,5 |
| 3 SK 1968 | 32,0 |
| 4 K 41 | 29,5 |
| 5 Brønshøj | 26,5 |
| 6 TF-Føroyar | 26,0 |
| 7 Nørresundby | 18,5 |
| 8 Århus | 17,5 |

**Føroysku einkultúrslitini**

| | |
|---|---|
| GM Einar Gausel | 4 av 6 |
| IM Nikolaj Borge | 2,5/7 |
| John Arni Nilssen | 3,0/7 |
| Flóvin Tór Næs | 3,5/7 |
| IM John Rødgaard | 2,0/3 |
| Heini Olsen | 3,0/6 |
| Eyðun Nolsøe | 1,0/5 |
| Carl Eli N. Samuelsen | 4,0/7 |
| Heini Danielsen | 3,0/7 |
| Arild Rimestad | 0,0/1 |

### Púra opið í Linares

Sjáldsama javnt er í síðvondu Linares kappingini í Spania. Peter Leko hevur hildið eina spinkla leiðslu síðani fyrsta umfar. Hann hevur vunnið tvey talv og leikt seks javnleikir. Beint í hølunum á honum koma Garry Kasparov og Vladimir Kramnik. Veselin Topalov og Alexei Shirov lúra eitt vet aftanfyri toppin, meðan spanska vónin Francisco Vallejo og hin ungi Teimour Radjabov stríðast í botninum.

Kappingin í ár hevur verið merkt av óvanliga nógvum stuttum javnleikum. Serliga verður Kramnik kritiseraður fyri at vera ov glaður fyri javnleik innan talvini eru gliðin inn í miðspælið.

Leko vann kappingina í fjør, og ikki tykist tað sum um Kasparov ella Kramnik megna at taka Leko aftur. Tó resta enn fýra umfør, og millum annað hittust Leko og Kramnik eftir evstamark týsdagin.

# Gentur 12 ár hjá VÍF greipuvinnarar

Leygardagin fingu 12 ára gomlu genturnar hjá VÍF steyp og gullkrónur handaðar, eftir at tær høvdu leikt síðsta dystin á árinum. Genturnar hjá VÍF hava vunnið bæði føroyameistaraheitið og steypakappingina í sínum aldursbólki, og tær hava vunnið allir dystirnar í kappingini uttan tann allarfyrsta, tá tær taptu móti StÍF. Sosialurin ynskir gentunum hjartaliga tillukku við greipuni.

**tn**



*Greipuvinnararnir hjá Gentum 12 ár VÍF: Aftast frá vinstru: Erla Olsen, venjari, Olivia Jensen, Angela Róadóttir, Ingilín D. Strøm, Agnas Olsen, Tóra Seloy, Linjan Djurhuus og Linda Davidsen. Mitt í frá vinstru: Halla Durhuus, Jona Zachariassen, Oddvør Vang, Sólja Thorleifsson og Sólgerð Joensen. Fremst frá vinstru: Vivian Petersen og Ragnhild á Heygum.*

# Talvið hesa vikuna

Topalov, V (2735) - Shirov, A (2736)
XXI SuperGM Linares ESP (10), 29.02.2004

1.e4 e5 2.Rif3 Ric6 3.Bb5 a6 4.Ba4 Rif6 5.0—0 Be7 6.Re1 b5 7.Bb3 d6 8.c3 0—0 9.h3 Ria5 10.Bc2 c5 (Ein hin kendasti og mest leikti varianturin í sponsku byrjanini) 11.d4 Fc7 12.d5 Ric4 13.b3 Rib6 14.a4 Bd7 15.a5 Ric8 16.c4 g6 17.Ric3 Rih5 18.Rie2 Re8 19.Ra2 Bf8 20.g4 Rig7 21.Rig3 f6 22.Rih2 Re7 23.h4 (Topalov hevur ongantíð verið nakar bangin telvari. Hann loypir beint í krovið á Shirov) 23...Rf7 24.f4! (Ætlar tú at niðurbróta svørtu betongverjuna, er neyðugt við slíkum ágangandi leikum) 24...exf4 25.Bxf4 Fd8 26.Rf1 Fe7 27.h5! (Viknar um svørtu kongastøðuna) 27...Rie8 28.Bd3 Bg7 29.Kg2 Ff8 30.Fc1 bxc4 31.bxc4 Rb8 (Svartur roynir sjálvsagt at fáa mótspæl) 32.Raf2 Rb3 33.Rf3 Rie7 34.Bd2 Bc8 35.Fc2 Rb8 36.Kh1 (Hvítur hevur góða tíð...) 36...gxh5 37.Rixh5 Rig6



Støðumynd eftir 37...Rig6

38.e5! (Avgerandi gjøgnumbrotsleikurin!) 38...dxe5 39.Bxg6 hxg6 40.Fxg6 e4 41.Rh3 Rfb7 42.Rif4 Rb1 43.Fh7+ Kf7 44.Fh5+ Kg8 45.Rig6 Shirov gavst. T.d eftir Fd6 kemur Bf4. 1—0